MASKINMEISTARAFELAGIÐ
GRØNLANDSVEGUR 58 POSTBOKS 3238 FO-110 TÓRSHAVN
TLF. +298 314718 FAX +298 318519 www.mf.fo mf@mf.fo

Tórshavn, 17. januar 2024

Til
Løgmansskrivstovuna

Hoyringsskriv í samband við "Løgtingsmál nr. xxx/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur)"

Maskinmeistarafelagið takkar fyri møguleikan at gera hoyringsskriv til "Løgtingsmál nr. xxx/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum sjórættur)"

Maskinmeistarafelagið er av teirri greiðu áskoðan, at yvirtøkan av málsøkinum viðv. sjórætti átti at verið yvirtikið fyri langari tíð síðan, serliga tá hugsað verður um týdningin sum føroyska sjóøkið hevur fyri alt samfelagið; herundir ta landafrøðiligu staðsetingina eins og almennu, vinnuligu og privatu áhugamálini sjóøkið hevur í síni heild.

Umframt eitt rúgvusmikið lógarverk, ið ætlanin er at yvirtaka, fylgja nógvar altjóða ásetingar, sum Føroyar binda seg til at halda. Altjóða samstavið í IMO, har Føroyar hava atlimaskap, fer somuleiðis at seta størri og fleiri krøv til okkara umsiting og stovnar, sum eftir Ólavsøku 2025 skulu umsitast av føroyskum myndugleikum burturav.

Í samband við ætlaðu yvirtøkuna av málsøkinum, vil Maskinmeistarafelagið gera vart við, at tá tað í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður ført fram, at mett verður, at kostnaðurin av yvirtøkuni av sjóøkinum kemur at kosta tvey ársverk, svarandi til 1,8 mió. kr. er Maskinmeistarafelagið ikki heilt samt í hesi útrokning. Samlaða ársverkið í almennu viðmerkingunum til uppskotið av lógini nevnir minst sjey størv, hetta svarar ikki til omanfyristandandi tvey størvini viðmerkingarnar leggja upp til. Út frá hesum metir Maskinmeistarafelagið ikki at kostnaðurin av yvirtøkuni kann vera neyvt útroknaður.

Tá talan er um Sjóvinnustýrið metir Maskinmeistarafelagið, at tørvur verður á minst trimum ársverkum hjá nevnda stovni, tá felagið metir, at tey ið einsini koma at umsita økið, eru eitt nú Maskinmeistarar, ið arbeiða á Sjóvinnustýrinum. Sambært sannføringini hjá Maskinmeistarafelagnum skal íløga gerast í nýggja vitan á økinum hjá Sjóvinnustýrinum, somuleiðis skal núverandi servitan á økinum haldast við líka.

Fyri at Føroyar skal fáa fulla góðkenning í IMO, skula somuleiðis ymiskar løggildugar góðkenningar og viðkomandi servitan, liggja hjá Sjóvinnustýrinum.

MASKINMEISTARAFELAGIÐ
GRØNLANDSVEGUR 58 POSTBOKS 3238 FO-110 TÓRSHAVN
TLF. +298 314718 FAX +298 318519 www.mf.fo mf@mf.fo

Hesa útrokning sær Maskinmeistarafelagið als ikki í frágreiðingini til lógaruppskotið og vil Maskinmeistarafelagið tí heita á Føroya Løgting og landsins myndugleikar um at varpa ljós á hesi viðurskifti og soleiðis tryggja at servitanin, løggildi og myndugleika viðgerðin verður raðfest, tí tað metir Maskinmeistarafelagið ikki verður gjørt í núverandi støðu.

Vinarliga

Arnfinn Bech, formaður